# Undrar seg yvir úttalilsi hjá

**STRÍÐ** – Eg skilji ikki ordiliga Jón Rasmussen, skipara á verksmiðjutrolaranum Norðborg. Herfyri bjóðaði felagið, sum eigur skipið, makrelkvotuna, sum teir ikki fiskaðu í fjør, út til royndarveiði, sigur Jacob Vestergaard, sum annars fegnast um góða prísin, ið Norðborg fær fyri makrel undan Føroyum

Vilmund Jacobsen




Í blaðnum mánadagin høvdu vit samrøðu við skiparan á verksmiðjutrolaranum Norðborg, Jón Rasmussen. Teir vóru just lidnir við túr og vóru nú á veg til lands við 1300 tonsum av sild og makreli, sum teir høvdu fingið í einar 14-16 dagar. Lastin hevði eitt virðið upp á umleið 10 miljónir krónur.

Nú eigur Norðborg at kalla ongan makrel eftir at fiska, og tá veiðan í løtuni er rættiliga blandað við sild og makreli, er spurningurin, um skipið yvirhøvur kann fara nýggjan túr undir verandi umstøðum.

### Heldur ikki orð

Í samrøðuni við Sosialin segði Jón Rasmussen, at Norðborg eigur 2.800 tons av makreli, sum lógu eftir frá undanfarna ári.

– Landsstýrismaðurin, sum í fjør heyst segði, at kvotan kundi flytast inn í 2010, sýtir nú fyri at útskriva okkum loyvi til at veiða hesi tonsini. Eg haldi, at orsøkin er, at landsstýrismaðurin er vorðin firtin, tí Felagið Nótaskip ikki hevur stuðlað honum í ætlanini at áseta Føroyum eginkvotu fyri makrel í 2010, men í staðin hevur mælt til at royna samráðingarleistin við hini londini, Noreg og ES, sum saman við Føroyum hava verið partur av strandalandaavtaluni.



UNDRAST

*- Knappliga er líkt til, at velduga tilfeingið, sum kemur í okkara sjógv í summarmánaðunum, nú er so ómetaliga nógv vert. Hetta fegnist eg sjálvsagt um, men undri meg líka so nógv yvir afturhaldandi hjá uppisjóvarskipunum, sigur Jacob Vestergaard*

**» ...tá árið er liðugt, detta allar kvotur burtur, sum ikki eru fiskaðar, og hetta er í prinsippinum eisini galdandi fyri kvotuna, sum lá eftir hjá Norðborg...**

JACOB VESTERGAARD

Skiparin á Norðborg sigur, at tá Noreg og ES í fjør heyst søgdu, at tey fóru at lata síni skip fiska makrelkvotu, sum lá eftir í 2009, í 2010, fingu vit at vita, at vit eisini skuldu sleppa at fiska tað, sum eftir lá hjá okkum í 2009.

– Talan er um virðir upp á umleið 20 miljónir krónur, segði Jón Rasmussen við Sosialin mánadagin.

### Kvotur detta burtur

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur seg undrast yvir hesi úttalilsi hjá skiparanum á Norðborg.

– Eg kenni sum so einki til hatta, sum Jón sigur. Eg skal ikki siga, at eg ikki havi nevnt handan møguleikan í onkrum samanhangi. Tá fyrst Noreg og síðan ES í fjør heyst søgdu, at tey fóru at flyta ófiskaða kvotu av makreli í árinum 2009 inn í 2010, kann eg sjálvandi hava sagt, at so fóru vit at gera tað sama. Hetta skal eg ikki afturvísa.

Landsstýrismaðurin sigur, at Noreg og ES komu við hesum útmeldingum av sínum eintingum, tó at tað ongantíð hevur verið við í strandalandaavtaluni millum londini, at ófiskað makrelkvota gongur inn í árið eftir.

– Tá árið er liðugt, detta allar kvotur burtur, sum ikki eru fiskaðar, og hetta er í prinsippinum eisini galdandi fyri kvotuna, sum lá eftir hjá